# Eitt nýskapandi umhvørvi



*Ólavur Gregersen, stjóri í Bitlandi, sigur, at tað er sera umráðandi at hava eitt gott vitanarnetverk í Føroyum, ið virkar væl, og sum kann verða við til at menna eitt nýskapandi umhvørvi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í hjartanum av Havnini húsast nakrar smærri fyritøkur undir somul lon, og endamálið við hesum er at menna eitt nýskapandi umhvørvi, sigur Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland**

MENNING

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Umframt Bitland eru tað eitt nú Simprentis, Sp/f Jónsvein Joensen, Dam sp/F, Syntesa og Winit, sum húsast undir somu lon.Harumframt hava hevur advokatfelagið Hentz og sálarfrøðingarnir Ásvør Skaalum, Oddbjørg Balle og Kári Leivsson skrivstovu í Tórsgøtu. Felags fyri hesar fyritøkur er, at tær allar eru smáar, hvat viðvíkur starvsfólkatali. Tað er eisini ein fyritreyt fyri, at fyritøkurnar kunnu verða við í nýskapandi umhvørvinum í Tórsgøtu, sigur Ólavur Gregersen.

### Altíð fleiri verkætlanir í gongd

Stjórin í Bitland sigur, at tað er ein styrkur at hava fleiri smærri fyritøkur undir somu lon, ið eisini gera gagn av hvørjum øðrum.

– Vit hava øll ymiskar førleikar, og í húsinum eru bæði búskaparfrøðingar, løgfrøðingar, verkfrøðingar og sálarfrøðingar. Hetta ger, at vit kunnu síggja verkætlanir, sum vit arbeiða við, frá nógvum ymiskum sjónarmiðum, og tað er avgjørt ein styrkur. Nógv kann líkjast í tí arbeiði, sum vit gera, men vit síggja trupulleikar og møguleikar við ymsum eygum, greiðir Ólavur Gregersen frá.

Hann sigur, at í løtuni arbeiðir Bitland við tí máli, at tað skulu stovnast ein til tvær fyritøkur um árið, ið eru nýskapandi, og sum hava altjóða marknaðarmøguleikar.

– Vit hava allatíðina tvær til tríggjar verkætlanir koyrandi, og hugsanin er, at tær skulu mennast her í umhvørvinum, til tær vaksa seg út um hetta umhvørvi, sigur Ólavur Gregersen.

### Umráðandi at hava eitt netverk

Stjórin í Bitland sigur, at tey eru sera fegin um at fáa eitt slíkt umhvørvi upp at standa her í Føroyum, tí av tí at okkara samfelag er so lítið, hevur tað sera stóran týdning, at man samstarvar innan vitanarøki.

– Vit eru so smá, og talentmassan aðrastaðnis er so stór, at tað er nógv lættari at fáa slík umhvørvi upp at standa uttanlands. Vit vita jú, at til dømis hava størstu fyritøkurnaruttanlandsmenningardeildir, ið eru líka stórar sum størstu fyritøkurnar her á landi. Tí hevur tað sera stóran týdning, at vit hava eitt gott vitanarnetverk, sum virkar væl, og har tað er lætt at fáa atgongd til vitanina hjá hvørjum øðrum. Tað vísir seg nevnliga, at virkar hetta netverk, gongur tað heila lættari, og góðskan verður hægri, sigur Ólavur Gregersen.

### Deilast um nógv

Í húsunum báðum í Tórsgøtu, sum Bitland og hinar fyritøkur húsast í, deilast tey um annað enn bara vitan.

– Tá ið tú leigar teg inn her, skalt tú einans hava telduna við tær. Innbúgv og øll vanlig nýtsla er íroknað húsaleiguna, men tú skalt sjálvur gjalda fyri telefonnýtsluna. Eisini eru átta tímar av skrivstovuhjálp um vikuna við í húsaleiguni, sigur Ólavur Gregersen.

Hann sigur, at sum er, er nóg mikið av plássi í mun til tørvin, men innan tvey ár verður vónandi neyðugt við størri hølum, ið helst skulu verða einar 600 til 800 fermetrar til støddar, sum hevði verið hóskandi.

---

# Sjónleikaskúlin vísti sínar dygdir



*Umframt at hava vant sjálvan leikin, hava næmingarnir á sjónleikaskúlanum eisini verið við til at gera búnar og pall.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Undir øllum leikinum var ein søgusigari, ið greiddi frá søgnunum, meðan tær blivu spældar.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Mikukvøldið og hósmorgunin vístu næmingar úr sjónleikaskúlanum í Havnar Sjónleikarafelag fram Søgur og sagnir, ið er ein leikur, sum er býttur upp í fýra smærri leikir**

SJÓNLEIKUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á hvørjum vetri hesi seinastu mongu árini hevur Havnar Sjónleikarafelag skipað fyri sjónleikaraskúla fyri børnum í skúlaaldri. Veturin, ið júst er farin aftur um bak, er einki undantak í so máta, og í vikuni hava næmingar á einum av bólkunum hjá skúlanum havt sýningar av leikinum Søgur og Sagnir, sum tey hava vant í vetur.

### Leggja lív og sál í leikin

Tað er einki at taka seg aftur í, at tey 14 børnini, sum eru við í leikinum, hava lagt lív og sál í hetta arbeiði, sum tey hava vant gjøgnum veturin. Umframt at hava vant sjálvan leikin, hava tey saman við leikstjóranum og læraranum, Hedvig Westerlund Kapnas, eisini gjørt búnar og pall.

Leikurin, Søgur og Sagnir, er býttur upp í fýra smærri leikir. Fyrsti partur av leikinum er eitt bræv, sum Jákup Jacobsen, doktari, skrivari. Síðani snýr leikurin seg um Gívrinar á Sandoynni, um Kjølur á Nesi, og seinasti partur av leikinum er um kendu søgnina um Snæbjørn.

Tey børnini, sum í vikuni hava víst henda leik fyri at kalla fullum sali í Sjónleikarahúsinum, hava øll gingið á sjónleikaraskúlanum í nøkur ár, so tey eru við at hava fingið sær nakrar royndir á økinum.

Hedvig Westerlund Kapnas sigur, at tað er sera stórur áhugi millum børn og ung í Havn at spæla sjónleik, og tað er vanligt, at langur bíðilisti er at sleppa á sjónleikaraskúlan, og á hvørjum ári eru tey noydd at siga nei til nakrar umsøkjarar. Tey børn, ið hava gingið á skúlanum áður, hava fyrstarætt at sleppa á skúlan, og royndirnar vísa, at tá børn fyrst eru sloppin á skúlan, ganga tey í fleiri ár.